# Deildarleiðari

Verandi leiðari á deild okkara í Saltangará fer í annað starv, og tí er starvið leyst at søkja.

Uppgávan hjá deildini er at selja teldur, tilhoyr, egin forrit og at veita kundum okkara ymiskar tænastur í hesum sambandi. Kundar okkara eru sum heild vinnulívið í Eysturoynni. Deildin røkkur eisini út til alt meginøkið.

Á deildini eru í løtuni 5 starvsfólk.

Vit kunna bjóða eitt áhugavert starv í einum sera skiftandi og tí tíðir hektiskum umhvørvi.

Leiðarin kemur, umframt at hava ábyrgdina av fíggjarligu gongdini og arbeiðsfólkunum, eisini at taka lut í sølu og tænastuvirkseminum.

Kunnleiki til teldur og ymiskan ritbúnað er ein fyrimunur.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn við nøkrum orðum um teg.

# IT–Supportari/ Datafagteknikkari

Til deild okkara í Saltangará verður søkt eftir IT–Supportara ella Datafagteknikkara.

Vit vænta, at tú ert fryntlig/ur og fyrikomandi og ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

Um hetta er nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn saman við nøkrum orðum um teg.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi 14. mars 2002.

**Com–Data P/F 736**
Postboks 19
Í Skálagarði
700 Klaksvík
att.: Olivur Thomsen

# Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki at arbeiða í sølubúðini og at matgera til 6 mans umborð á strandferðaskipinum Teistanum – (Sandoyarleiðin).

Arbeitt verður í skiftisvaktum eina viku umborð og eina viku frí. Góð løn verður givin. Tú skal bert kunna matgera vanligan føroyskan mat.

**Áhuga kunnu ringja 211099 ella 361299**

# Norðoya Javnaðarfelag

## Uppstillingarfundur

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur verður í Bøgøtu 3, mánakvøldið 4.3. kl. 19.30.

**Nevndin**

# KT fólk til ORACLE á Hagstovuni

Vit sóknast eftir einum væl útbúnum starvsfólki til KT deildina.

Arbeiðið á Hagstovuni er skipað á tann hátt, at flestu hagtalsuppgávur verða loystar í samstarvi millum hagfrøðingar og KT starvsfólk, og tað er til slíkar verkætlanir, at vit sóknast eftir einum fólki.

KT skipanirnar á Hagstovuni eru grundaðar í einum ORACLE umhvørvi við bæði UNIX og WINDOWS teldum. Í arbeiðinum á KT deildini verða brúkt ORACLE menningaramboðini SQL, PL/SQL, DEVELOPER og DESIGNER.

Kunnleiki til eitt ella helst fleiri av hesum amboðum er ein fortreyt.

Trý fólk eru í KT-deildini, og eru tey uppi í øllum verkætlanum á stovninum. KT arbeiðið á stovninum er eyðkent av, at nýggjar skipanir alsamt verða mentar, samstundis sum verandi skipanir verða viðari mentar. Sostatt er arbeiðið ógvuliga fjølbroytt og møguleiki er at royna seg á nógvum KT økjum.

Starvið verður lønt í samsvari við førleikar og starvsinnihald, sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 15. mars 2002.

Til at fáa meira at vita um starvið, set teg í samband við Berg Dam ella Hermann Oskarsson á Hagstovu Føroya, telefon 35 28 00.

# Frá FK í Klaksvík

Ársfundurin verður á Klaksvíkar Sjómansheimi 19. mars 2002 kl. 20.00.

Skrá sambært lógini.

**Nevndin**

# Til sølu

Ein Volvo S60 við nógvari eykaútgerð, verður seldur við avsláttri. Bilurin er gulur (metallakk) og er 10 mánaðar gamal.

**Tlf. 213388**

# Hondlesing í Tórshavn

## í døgunum 1.-4. apríl

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein annarleiðis máti at síggja teg sjálvan.

Ring og bið um tíð á
**tlf. 0045 39664880** aftaná kl. 16.00

# Lastbilur, maskinur og skrivstovuinnbúgv til sølu

Vegna Sp/f Fagralíð, 165 Argir í konkurs verður hervið lýst til sølu.

**Scania lastbilur** 142 Diesel v/intercooler, árg. 1987.

**Maskinur:**
- 1 stk. Trukkur - gassdrivin
- 2 stk. Indicator Scanvekt, 8.600, vigar 60 kg.
- 1 stk. Volfking slógvmaskina + 1 spola og kontakt
- 1 stk. heilautomatisk bandmaskina
- 1 stk. UBI printari
- 1 stk. rullibanavekt
- 1 stk. skeriborð
- 1 stk. lyftivognur til kassar
- 1 stk. Compact 500 KEV trýstspulari
- 1 stk. Karcher HD 850 S trýstspulari v/ trýstslangu, greb, rør og dysu
- 1 stk. radio v/diskspælara
- 1 stk. vatnslanga við rullustativi
- 34 stk. kassar á 1.000 kg. og 400 kg. flamingokassar v/lok. Træplattar

**Skrivstovuinnbúgv:**
- 2 stk. Fujitsu Myrica teldur, 128 MB Ram, 20 GB Harddisk, árg. 1999
- 1 stk. Lasat unique 1280i ISDN modem
- 1 stk. Canon BJC–2100 printari
- 3 stk. skrivstovuborð
- 3 stk. kontórstólar
- 3 stk. spísiborð og 8 stólar

Áhugaði kunnu venda sær til **Advokatfelagið við Strond 4**, fyri nærri upplýsingar, og avtalað kann gerast um at síggja lutirnar.

Boð skulu verða okkum í hendi innan **06.03.2002**, og tilskilar búgvið sær rætt til, at velja millum innkomin boð, herundir til ikki at góðtaka nakað boð.

Tórmóður Djurhuus, adv.
Dánjal Magnussen, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv.
Anna Dam, adv.
Ingi Højgaard, adv.

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 • 100 Tórshavn
tlf. 311260 • fax 311261
e–mail: advokatfelagid@kallnet.fo

# BMW 520i til sølu

3 1/2 ára gamal, koyrt 47.000 km. Nógv eykaútstýr t.d. aut. klimaanlegg, hita í setrum og róðri, multifunktiónsróður við m.a. fartpilot, edeltræ á instrumentbretti og hurðum, armlen framman, sentrallás og el-spegl.

Er í sera góðum standi.

Boð undir 290.000 kr. hava ongan áhuga.

**Tlf. 332569 ella 283569**
*eftir kl. 17.00*



# SUPER DEKK

Søkir eftir røskum og dugnaligum bilsmiði ella persóni við líknandi førleika at byrja skjótast gjørligt.

**Løn:** Sambært avtalu.

Um tú ynskir at vita meir um starvið, kanst tú venda tær til Super Dekk Sp/f tlf. 314975 ella 214975, og tosa við Fríðrik Bláhamar.

**Sp/f SUPER DEKK**
Hoyvíksvegur 66 · Postboks 3012 · FO–110 Tórshavn
Tlf.: (+298) 314975 · Fax: (+298) 318172 Fartlf.: (+298) 214975
e-mail: superdek@post.olivant.fo

# Atlantic Petroleum — Ársaðalfundur 2002

Við hesum verður innkallað til áraðalfund hjá P/F Atlantic Petroleum, at verða í aulini á Føroya Læraraskúla, fríggjadgin tann 15. mars 2002 kl. 17.00 við fylgjandi fundarskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Framløga av grannskoðaum ársroknskapi til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskap og ársfrágreiðing
4. Val av nevnd. Tríggir nevndarlimir standa fyri vali.
5. Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.
6. Ymiskt

Tórshavn, tann 28. februar 2002
Nevndin

# Skeið í teldubókhaldi í Suðuroy

## Skeið 1: Fíggjarstýring við EDB-Finans

**Endamál:** At læra at nýta telduforrit í bókhaldsarbeiði, á skeiðnum verður forritið Stellar Økonomisystem brúkt.

**Innihald:**
- Grundleggjandi roknskaparhugtøk (ársroknskapur og kontolæra), lógargivin krøv og fyriskipan av bókhaldsfunksjónini
- Uppseting av finansskipanini og gjøgnumgongd av neyðugari uppseting við atliti til egnan tørv
- Gjøgnumgongd av kontoplan og tess týdningi
- Dagligar bókingar, avstemmingar, útskriftir
- Finansútskriftir – m.a. kontokort og balansa
- MVG
- Lyklatøl og fíggjarætlan – mánaðarliga og árliga
- Trygdaravrit og viðlíkahald

**Tíðarskeið:** 25. mars og 8. apríl 2002 kl. 18.00 – 22.00
**Stað:** Hvalbiar skúli
**Kostnaður:** kr. 1.750,– íroknað frálæru, tilfar og mat

## Skeið 2: Fíggjarstýring við EDB – Debitor- og goymslustýring

**Endamál:** At læra at nýta telduforrit til debitor- og goymslustýring, á skeiðnum verður forritið Stellar Økonomisystem brúkt.

**Innihald:**
- Samanhangur millum fíggjar- og debitor/goymslumodulið
- Vørubilegging/fakturi/tilboð
- Upprættan og viðlíkahald av debitor og debitorbólkum
- Rentutilskrivan/rykkjaraframferð og kontoyvirlit
- Upprættan og viðlíkahald av vørum og vørubólkum
- Hagtøl og útskriftsmøguleikar
- Snið til fakturar, kontoyvirlit

**Tíðarskeið:** 22. og 29. apríl 2002 kl. 18.00 – 22.00
**Stað:** Hvalbiar Skúli
**Kostnaður:** kr. 1.750,– íroknað frálæru, tilfar og mat

Farið verður undir útbúgvingina um nóg stór undirtøka verður. Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing fæst við at venda sær til okkum á tlf. 318813.

Føroya Handilsskúli — TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • 110 Tórshavn
tlf: 318813 • fax: 313374 • t-postur: fh-sht@post.olivant.fo

# HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Hjálparfólk

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til hálva tíð til at vaska útgerð og annað fyrifallandi arbeiði á kanningarstovunum.

Eingi formlig krøv verða sett til útbúgving, men royndir á økinum eru til fyrimuns.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærløgd / nærlagdur og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Starvið verður sett sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í 1. lønarflokki, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Umsóknir til starvið við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. mars 2002.

Starvið verður sett sum skjótast.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Maritu Poulsen, deildarleiðara.

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

# STÓRT TILTAK Í ARGJA SKÚLA

Leygardagin 2/3-2002 frá kl. 15.00



Mattombola
Bommtombola
**Café**
Lutaseðlasøla
Klatriveggur
**Skreiðirør**
Fiskibrunnur
**Hoppiborg**
Ponyríðing

**5.b í Argja Skúla**